

# Fyrivarin… heldur enn eftirsnarin!

Søkt verður eftir SSP-ráðgeva at byrja 15. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

Starvið sum SSP-ráðgevi er eitt nýskipað starv við nógvum spennandi avbjóðingum, har viðkomandi skal seta SSP skipanina í verk og samskipa arbeiðið framyvir.

**Um starvið**
SSP-ráðgevin skal bæði virka sum sambindingar- og samskipanarlið millum myndugleikarnar og arbeiðið í økjunum at fyribyrgja kriminaliteti og niðurbrótandi atburði millum børn og ung. Eisini skal ráðgevin skipa fyri arbeiðinum at byggja upp eina ráðgevingartænastu innan SSP.

Endamálið við SSP-arbeiðinum er at fyribyrgja kriminaliteti millum børn og ung og at hjálpa teimum, ið hava framt kriminalitet, ella sum eru í hesum vandabólki, at koma burtur úr aftur tí truplu støðu, tey eru í við atliti at m.ø. harðskapi, rúsevnum, lógarbrotum, óhóskandi og niðurbrótandi atburði.

**Høvuðsuppgávur hjá SSP- ráðgevanum eru:**
- at samskipa SSP-arbeiðið
- at menna hugskot til fyribyrgjandi arbeiði
- at vera sambindingarlið millum leiðslubólk, samskipanarbólk og arbeiðið í økjunum kring landið
- at ráðgeva og vegleiða bæði skúlum og stovnum um fyribyrgingararbeiði
- at skipa fyri undirvísing og upplýsing fyri børnum, ungfólki, foreldrum og øðrum í sambandi við fyribyrgjandi átøk
- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning í sambandi við útgreiningar, átøk og nýhugsan um fyribyrging.

**Vit vænta, at viðkomandi:**
- hevur eldhuga, orku og áræði at standa á odda fyri at fáa SSP-arbeiðið í Føroyum at virka
- dugir at seta í verk kanningararbeiði og leiða verkætlanir
- dugir væl at samstarva og skapa virðing fyri arbeiðinum
- hevur hugsjónir um fyribyrgjandi arbeiði og menningarmøguleikar innan økið

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum og góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari kann hava eina fakliga útbúgving sum t.d. sosialráðgevi, lærari, løgreglufólk ella aðra viðkomandi útbúgving. Harumframt er tað ein fyrimunur, at viðkomandi hevur kunnleika til økið og royndir innan ráðgeving og fyribyrgjandi arbeiði millum børn og ung.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Væntast kann, at starvið hevur við sær nakað av ferðing bæði í Føroyum og uttanlands. Partur av arbeiðinum kemur at ganga fyri seg uttan fyri vanliga arbeiðsstíð.

SSP-ráðgevin kemur at starvast á Barnaverndarstovu Føroya saman við løgfrøðingi, sosialráðgeva, sálarfrøðingi og skrivara.

**Umsókn**
Umsókn saman við avriti av prógvi, skeiðsváttanum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Barnaverndarstovu Føroya í hendi í seinasta lagi **16. juni 2008 kl. 14.00.**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Barnaverndarstovu Føroya, Onnu Dam, leiðara, tlf. 30 24 95.

**Umsóknin verður stílað til:**
Barnaverndarstovu Føroya
R. C. Effersøesgøtu 30
100 Tórshavn

Ella sum teldubræv: ad@bvs.fo

## Hvat er SSP?

SSP er skipað sum eitt tvørfagligt samstarv millum Skúlaverk, Sosialar myndugleikar og Politi, sum eru stovnar, ið hava serliga ábyrgd fyri trivnaði og uppvøkstri hjá børnum og ungum.

SSP skipanin hevur sum aðalreglu at savna og samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið og fremja felags fyribyrgjandi atgerðir.

Almanna- og heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, Løgreglan, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og Barnarverndarstova Føroya hava ábyrgd av SSP-skipanini

**Les meira á www.bvs.fo**